# Sendistovan í Brússel marknaðarførir føroyskan tónleik



Jonhard Eliasen, føroyskur sendimaður í Brússel, sigur, at konseptið Atlantic Soundscapes er somuleiðis týdningarmikið amboð, ið Uttanríkisráðið nýtir í sambandi við branding av Føroyum

TÓNLEIKUR
*Esper H. Hansen*
*polh@sosialurin.fo*

**Føroyska Sendistovan í Brússel arbeiðir við at marknaðarføra føroyskan tónleik á evropiska meginlandinum**

Sosialurin hevur tosað við føroyska sendimannin í Brússel, Jonhard Eliasen, um leiklutin hjá Føroysku Sendistovuni á Transmusikales festivalinum.

Jonhard Eliasen greiðir frá, at Sendistovan í Brússel í eina tíð hevur arbeitt við at marknaðarføra føroyskan rútmiskan tónleik á meginlandinum í Evropa undir heitinum Atlantic Soundscapes. Konseptið Atlantic Soundscapes er somuleiðis týdningarmikið amboð, ið Uttanríkisráðið nýtir í sambandi við branding av Føroyum. Avtalan, ið ORKA og Budam hava fingið við Tranmusikales festivalin, er ein avleiðingin av Atlantic Soundscapes tiltakinum, ið varð hildið í Brússel í mai 2008.

Spurdur um tað er rætt, at tað er tað almenna skal marknaðarføra føroyskan tónleik svarar Jonhard Eliasen, at avgerandi fyri møguleikarnar hjá føroyskari tónleikavinnu at skapa sær inntøkur á meginlandinum, er, at eitt føroyskt undirstøðukervi verður bygt upp, ið kann beina føroyskan tónleik út á røttu støðini í Evropa - eisini tey virtuellu støðini á alnótini.

Føroyskuvinnuliguáhugamálini eru at sleppa so langt út eftir virðisskapanarketuni, sum til ber. Hetta er neyðugt, um framleiðslan hjá gávuríku tónleikarum okkara ikki skal enda sum rávøruútflutningur til útlendska vinnuídnaðinum at gera sær dælt av.

Tætt samstarv hevur eftir hesari tankagongd í seinastuni verið millum TUTL og Uttanríkisráðið. Hetta samstarvið hevur havt við sær, at víðfevnt netverk er bygt upp millum TUTL og booking-feløg og aðrar partar innan tónleikavinnuna í Týsklandi, Fraklandi, Niðurlondum og øðrum londum við. Sáttmálarnir, sum TUTL í hesum sambandi hevur fingið í lag, skuldu givið TUTL mundi betri møguleikar til at veita dyggar tænastur til tónleikarar, sum hava førleika, dirvi og vilja at royna avbjóðingarámarknaðunum í Vesturevropa, sigur føroyski sendimaðurin í Brússel at enda.

# ORKA og BUDAM hugtaka í Frankaríki

TÓNLEIKUR
*Pól Esper H. Hansen*
*polh@sosialurin.fo*

Eftir tvær tær fyrstu konsertirnar á TransMusicales í Rennes hava føroysku tónleikabólkarnir ORKA og Budam fingið sera góð ummæli frá fjølmiðlunum. Somuleiðis hava báðir bólkarnir fingið tilboð um at spæla ymsastaðni kring Evropa.

Bæði ORKA og Budam hava fingið tilboð um at koma at spæla á kenda spælistaðinum ROYAL FESTIVAL HALL í London. Hetta verður í sambandi við Noise of Art festivalinum 19. apríl 2009.

Ein hópur av miðlum hava gjørt samrøður við og um ORKA og Budam, eitt nú The Observer.

Í næstu vikur fer størsta tónleikablaðið í Onglandi, NME, at útgeva langa grein um ORKA og Budam.

Í dag fer størsta franska sjónvarpsrásin TF1 at vísa brot av samrøðu við limirnar i ORKA.

RFI, franska útgávan av BBC, fer sendi eitt 10 minuttir langt innslag av teirra samrøðu við ORKA í gjárkvøldið.









